# Skjalasavnið spílar seg út

**Føroya Landsskjalasavn letur í hesum døgum upp eina forvitnisliga framsýning á Debesartrøð í Havn. Millum áhugaverdu skjølini á framsýningini er eitt heitt brævaskifti millum eina kvinnu av Viðareiði og tveir biðlar, ið báðir vilja hava ást hennara**



*Sámal Tróndur Johansen, landsskjalavørur, sýnir fram nøkur skjøl, sum eru við á framsýningini*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

FRAMSÝNING
*Stefan í Skorini*
*stefan@sosialurin.fo*

Leygardagin tann 8. november hava skjalasøvn í øllum Norðurlondum tikið seg saman til at hava ein skjalasavnsdag. Hetta átak hevur verið fyriskipað nakrar ferðir áður, men hetta er so fyrstu ferð, at skjalasavnið her á landi er við.

Ætlanin við hesum norðurlendska samtakinum er at gera skjalasøvnini meira sjónlig yvirfyri almenninginum. Í Føroyum hevur skjalasavnið sett upp eina framsýning, sum vísir nakað av tí, ið savnið liggur inni við. Framsýningin letur upp í dag, leygardagin, og hon verður standandi í eina viku.

– Vit hava lagt okkum eftir at vísa nøkur áhugaverd skjøl, ið sýna nakrar brotbitar av savninum her úti, sigur Sámal Tróndur Johansen, landsskjalavørur.

### Heitar kenslur

Hóast eitt skjalasavn mangan kann tykjast kalt og kensluleyst, so liggur savnið eisini inni við skjølum, ið hýsa heitum kenslum og blómandi kærleikslívi.

Skjalasavnið hevur nevniliga fingið hendur á fleiri brøvum, sum eru send til Petronellu Jensdatter á Viðareiði. Avsendararnir eru tveir ungir mans, ið báðir bera ást til Petronellu.

Hesir eru handilsmaðurin Poul Østerø, sum helst var ættaður av Mikladali ella Tróllanesi men búsitandi í Havn, og kongsbóndin Niclas Andreasen úr Kunoy. Teir royna hvør í sínum lagi at geva sínar kenslur til kennar. Í brævinum sæst at handilsmaðurin eitt nú hevur givið Petronellu einar gummistyvlar.

Endin er tó tann, at Petronella velur kongsbóndan úr Kunoy, og tey giftast heili átta ár aftaná, at brævaskiftið er byrjað.

### Privat skjøl

Á landsskjalasavninum liggja fyri tað mesta almenn skjøl, sum ikki er loyvt at beina burtur. Verri er við privatum skjølum. Tað er einki krav um, at privat skjøl skulu varðveitast, og tí enda tey ofta í ruskdunganum, hóast fleiri teirra eru sera áhugaverd og kunnu vera við til at varpa ljós á ymisk søgulig viðurskifti, sum vit ikki vita serliga nógv um.

Millum skjølini, sum verða sýnd fram, er millum annað ein umsókn frá bygdafelagnum Ternuni á Viðareiði frá 40-unum. Ætlanin hjá felagnum er at savna pening til at byggja ein svimjihyl í bygdini og søkir tí um loyvi at skipa fyri tombola og lutaseðlasølu. Skjølini vísa ikki, hvussu stórt yvirskotið var, men enn er eingin svimjihylur á Viðareiði.

Annars er skjalasavnið sett á stovn í 1859. Løgtingið samtykti í 1920 at byggja eitt nýtt skjalasavn, men spakin varð ikki settur í fyrr enn í 1928, og bygningurin stóð liðugur í 1932. Hetta er tann eyðkendi grótbygningurin á Debesartrøð.

Í 1974 stóð tann núverandi bygningurin á Debesartrøð klárur at taka í nýtslu. Skjølini eru tó so mong í tali, at tað harumframt er neyðugt at leiga høli. Skjalasavnið hevur í løtuni umleið 16 milliónir skjøl liggjandi á goymslu.

# Atlantic spennir seg út á íslandsrutuni

**– Vit vilja satsa meira uppá íslandsrutuna, og málið hjá okkum er at økja munandi um talið av ferðandi millum Føroyar og Ísland, sigur Magni Arge, stjóri í Atlantic Airways**



*Atlantic Airways yvirtekur nú íslandsrutuna, og føroyska flogfelagið fer at selja bíligar ferðaseðlar millum Føroyar og Ísland*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

FLOGFERÐSLA
*Stefan í Skorini*
*stefan@sosialurin.fo*

Í næstum fer Atlantic Airways at flúgva tvær ferðir um vikuna til Íslands. Hetta verður mánadag og fríggjadag.

Í løtuni flúgva 9000 fólk á hesi rutuni um árið, og ætlanin hjá føroyska flogfelagnum er at røkka 15.000 ferðandi um árið. Við øðrum orðum skal talið av ferðandi vaksa við umleið fimmti prosentum.

Hetta málið skal røkkast við at seta prísirnar niður, og økja um reglusemið á rutuni.

### Atlantic tekur yvir

Higartil hava Atlantic Airways og Icelandair verið saman um íslandsrutuna. Atlantic hevur flogið fríggjadagar, og Icelandair hevur flogið mánadagar.

Nú hevur Atlantic átikið sær at flúgva mánadagar eisini, so at Icelandair ikki er við á hesi rutuni longur. Atlantic fór at flúgva til Íslands fyri fyrstu ferð í 1995, og nú tekur føroyska flogfelagið yvir.

– Vit vilja stimbra ferðsluna til Íslands, so at fleiri føroyingar og íslendingar kunnu vitja londini hjá hvørjum øðrum, sigur Magni Arge.

Fyri tað fyrsta verða prísirnir settir munandi niður. Bíligastu einvegis ferðaseðlarnir vera at fáa fyri 595 krónur. Harafturat koma so avgjøld á nakrar hundrað krónur. Treytin er tó, at hesir ferðaseðlarnir verða bílagdir tríggjar vikur frammanundan.

Hægsti prísurin fyri ein einvegis ferðaseðil til Íslands verður nú 2000 krónur, har hann var 5800 áður.

Teir lægstu prísirnir fáast tó bert við at bíleggja og keypa á internetinum. Um bílagt verður við telefon kostar avgreiðslan 220 krónur, men um bíleggingin fer um internetið kostar tað 100 krónur.

### Reglusemið betrað

Nú tá Atlantic Airways fer at flúgva einsamalt á íslandsrutuni, batnar reglusemið munandi. Flogførini hjá Icelandair høvdu ikki eins góðan førleika at lenda í Føroyum, tí tey krevja betri sýni enn jet-flogførini hjá Atlantic. Tískil kann roknast við, at flogførini lenda og flúgva oftari til tíðina enn higartil.

Aðrar avmarkingar eru tó á teimum bíligu ferðaseðlunum. Eitt nú verður tænastan umborð avmarkað. Eingin refundering verður at fáa, og tú fært bert tann fyrsta sjussin fyri einki. Vilt tú hava fleiri, skalt tú rinda fyri hetta. Tænastan verður annars sum vanligt.

– Við hesum átakinum vilja vit lata dyrnar upp fyri einum spennandi og mennandi samstarvi. Vit vilja fegin hava, at fleiri fólk ferðast á hesi rutuni, og eg haldi ikki, at tað ber til at seta prísin longur niður enn hetta. Eg rokni ikki við, at meira enn helmingurin av øllum føroyingum hava verið í Íslandi, men nú er ein góður møguleiki at vitja okkara nærmastu grannar, sigur Magni Arge at enda.



## UTTAN ÚR HEIMI

# Bush endurtekur Vietnam í Irak



*Myndir sum hendan eru sera óhepnar fyri George W. Bush, forseta, nú valstríðið upp undir forsetavalið næsta ár nærkast. Á myndini síggjast hjálmarnir hjá teimum amerikonsku hermonnunum, sum doyðu, tá tryla teirra varð skotin niður í Irak seinasta sunnudag*

**At USA hevur gjørt av at taka hermenn úr Irak minnir um afturtøkuna úr Vietnam, siga atfinnarar, sum eisini leggja George W. Bush, forseta undir at seta egin áhugamál fram um alt annað.**

USA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Álitið á George W. Bush, forseta minkar, so hvørt tað frættist, at amerikanskir hermenn hava latið lív í Irak. Og tað hendir at kalla hvønn dag og stundum fleiri ferðir um dagin. Í november næsta ár verður forsetaval í USA, og forsetin hevur lítlan hug at fara undir valstríðið, samstundis sum fjølmiðlarnir bera tíðindi um deyðar og særdar amerikanskar hermenn í Irak, verður sagt.

Samstundis hevur forsetin lagt dent á at beina fyri teimum seinastu leivdunum av stýrinum hjá Saddam Hussein, og at Saddam sjálvur verður tikin og drigin fyri rættin, um hann framvegis er á lívi. Skal hann røkka hesum máli, má forsetin fáa samstarv í lag við irakar, og tí hevur hann nú lovað, at irakar skulu fáa størri ábyrgd av trygdini í landinum.

Hetta er júst sama mannagongd, sum Richard Nixon nýtti í Vietnam tíðliga í sjeytiárunum, siga summir amerikanskir eygleiðarar. Nixon lat suðurvietnamesiskar herdeildir átaka sær ein størri part av krígnum við Norðurvietnam og FNL-uppreistrarfelagsskapin.

Amerikanararnir mistu 58.000 hermenn í tí tíggju ára langa krígnum í Vietnam. Í Irak hevur USA mist nógv færri hermenn, men fleiri og fleiri amerikanarar eru kortini farnir at tosa um Irak sum eitt nýtt Vietnam, skrivar AFP.

### Irakisering

– Stjórnin í Washington er ørkymlað av vantandi framgongdini á hermótinum og av teirri víkjandi politisku undirtøkuni í sjálvum USA. Hon hevur tí valt at lata irakskar politikarar og hermenn fáa størri ábyrgd, skrivar eygleiðarin Fareed Zakaria í tíðarritinum Newsweek og blaðnum Washington Post.

– Hetta fer uttan iva at gera, at færri amerikanskir hermenn fara at doyggja í Irak. Fyrr kallaðu vit hetta vietnamisering, í dag eitur tað irakisering, skrivar Zakaria í greinini.

USA hevur í løtuni 132.000 hermenn í Irak, men verjumálaráðið hevur boðað frá, at til várs verður talið skert til 105.000. Samstundis ætla amerikanarar at økja manntalið í iraksku løgregluni og herinum úr tí verandi 118.000 í 170.000.

Sambært Donald Rumsfeld, verjumálaráðharra fer skerjingin í amerikanska hermannatalinum ikki at ávirka tann hernaðarliga førleikan hjá USA í Irak, men fleiri atfinninarar, teirra millum republikanski senatorurin John McCain, halda hetta vera skeivt. Hann og aðrir halda, at tað verður líka stórur tørvur á amerikonskum hermonnum í Irak næsta ár sum nú.

# Norðurkorea viðgongur at hava kjarnorkuvápn

**Norðurkoreanski sendiharrin í London sigur, at Norðurkorea er ført fyri at nýta kjarnorkuvápn.**

NORÐURKOREA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Ri Yonh Ho, sum er norðurkoreanskur sendiharri í London, segði í gjár, at land hansara hevur kjarnorkuvápn, og at tey eru klár at taka í nýtslu, gerst tað neyðugt.

Hetta er fyrstu ferð, at eitt umboð hjá myndugleikunum í Pyongyang váttar, at landið hevur kjarnorkuvápn.

Sendharrin segði, at vápnini eru einans ætlað til verjuendamál, og at Norðurkorea fer ikki at aftra seg við at brúka tey, verður tað neyðugt. Men tey verða ikki nýtt til álop, legði hann afturat.

## Stillar uppaftur

Forsetin á Taiwan, Chen Shui-bian, kunngjørdi í gjár, at hann fer at royna at verða afturvaldur á forsetavalinum í mars næsta ár.

Í komandi valstríðnum fer forsetin serliga at leggja dent á viðurskiftini millum Taiwan og Kina. Kinesisku politikararnir meta framvegis Taiwan sum ein landspart, sum hevur slitið seg leysan frá meginlandinum, og tí er spurningurin um viðurskiftini landanna millum sera viðkvæmur. Men tað tykist ikki ørkymla Chen. Herfyri segði hann, at Kina og Taiwan eru tvey lond, sum liggja hvør sínu megin Taiwan-sundið. Tey orðini fullu ikki í góða jørð í Beijing.

Nú Chen Shui-bian hevur gjørt av at stilla uppaftur, skal flokkur hansara góðkenna hann sum valevni. Tað verður tann 10. desember, men eygleiðarar siga, at eingin ivi er um, at Chen verður góðkendur sum valevni floksins.

## Sjáldsama lýtt í Noregi

Tað er ikki bara í Føroyum, at tað hevur verið lýtt seinastu dagarnar. Ja, í onkrum plássum hevur tað verið sum í Suðurlondum.

Í Noregi hevur tað verið so lýtt hesa vikuna, at fólk vita ikki um slíka lýkku í november mánað fyrr. Í Tafjord í Sunnmøre máldu tey heili 21,8 stig hósdagin, og so nógvur hiti er ikki máldur í Noregi, síðani hitamátingarnar byrjaðu í 19. øld. Metið frammanundan var frá 1884, tá 18,5 stig vórðu mátað í Sunndalsøra. Tað sigur ikki so lítið um tann nógva hitan, at vanliga liggur meðalhitin í Tafjord um fimm stig í november, skrivar Dagsavisen.

Eisini í høvuðsstaðnum Oslo kundu fólk fegnast um lýtt veður. Har vóru sjey stig hósdagin. Meðalhitin í Oslo í november plagar annars at vera trý stig.

## Gloymdu Malta og Kypros

Fólk á Malta og Kypros eru í øðini, tí tær báðar oyggjarnar eru als ikki at finna á teimum nýggju evruseðlunum.

Málið verður mett so álvarssamt, at tað er nú tikið upp á politiskum stigi. Bæði Malta og Kypros fáa limaskap í ES 1. mai næsta ár, og kypriski fíggjarmálaráðharrin, Marcos Kyprianou, sigur, at sjálvandi skal oyggin standa á evruseðlunum. Hann hevur tí vent sær til evropeiska meginbankan í Frankfurt, sum eftir øllum at døma verður noyddur at prenta fleiri milliónir nýggjar evruseðlar, skrivar NTB.

Tað eru nú ikki bara Malta og Kypros, sum eru horvin av tí vanliga Evropa-kortinum, tnú evruseðlar verða prentaðir. Eitt nú er bara Svøríki at síggja á skandinavisku hálvoynni. Noreg er strikað burtur, men tað kemst sjálvandi av, at Noreg er ikki limur í ES og hevur heldur ikki søkt um at sleppa uppí.

## Bøkur vorðnar ov dýrar

Ein kanning í Noregi vísir, at bøkur eru dýrkaðar umleið 40 prosent meiri enn aðrar vørur og tænastur tey seinastu tjúgu árini. Verður bókaprísurin borin saman við tað, sum onnur mentanartiltøk kosta, er bókaprísurin hækkaður heili 65 prosent meiri.

Í 1980 kostaði tað í meðal 100 krónur at keypa eina norska bók. Í dag er meðalprísurin 349 krónur, men skuldi bókaprísurin havt fylgt prísgongdini á øðrum vørum og tænastum, átti ein bók at kosta í meðal 274 krónur í dag, siga Knut Løyland og Vidar Ringstad, sum hava gjørt kanningina.

Teir báðir halda, at tað er tann stóra miðsavningin innan norska bókaútgávu, sum hevur gjørt bøkurnar so dýrar. Fyrr vóru forløgini væl fleiri í tali enn í dag og kappingin tískil størri, men í dag eru tað nøkur fá forløg, sum sita á meginpartinum av útgávunum.